## DAGSINS MEINING

# Løgin umbering hjá dønum

Nú eru umberingarnar hjá donsku stjórnini fyri at sýta føroyingum at yvirtaka løgregluna so langt burturi frá vanligari politiskari siðvenju millum ríkið og heimastýrið, at tað kann ikki vera annað enn drál og mótvilji, at føroyingar sjálvir umsita løgreglu og rættarmál.

Tað er løgið, at tann danska stjórnin ikki áður hevur ført tað fram, at fyri at føroyingar kunnu yvirtaka løgreglu og rættarmál, skal heimastýrislógin broytast fyrst.

Løgregla er at finna á listanum yvir B-mál, og eftir heimastýrislógini kunnu tey yvirtakast eftir samráðingar. Og tær samráðingarnar mugu sjálvandi enda í semju millum stjórnarmyndugleikarnar og heimastyrið.

Brævið hjá Frank Jensen, løgmálaráðharra, hevur ikki nakrar serligar grundgevingar, um nakrar veruligar grundgevingar eru fyri, at føroyingar ikki kunnu yvirtaka løgregluna. Á hesum staði er áður ført fram, at tað eru kanska altjóða reglur og avtalur millum sjálvstøðug lond um løgreglu og rættarviðurskifti, sum kunnu skapa trupulleikar. Men eru slíkar forðingar, átti løgmálaráðharrin at kunna víst á tær.

Tað kemur alt meiri og meiri til sjóndar, at danska stjórnin bæði er ímóti, at føroyingar yvirtaka fleiri málsøki, lækka blokkin, ella í evsta føri skipa Føroyar sum fullveldi. Tað behagar óivað tí partinum av Føroya fólki, sum annaðhvørt ikki ynskir størri sjálvræði, tíansheldur fullveldi. Men illviljin frá donsku stjórnini hevur júst ta avleiðing, at fleiri siga, at nú kann vera well við hasum danska kolonipolitikkinum.

Viðmerkingar ta seinastu tíðina frá landsstýrismannninum í sjálvstýrismálum benda á, at onkur vil hava konfrontatión, meðan løgmaður, sum rætt er, er meiri sinniligur. Rætt er eisini, sum hann hevur gjørt vart við, at løgreglumál er mál, sum kann yvirtakast eftir samráðingar. Men hvar er andstøðan í hesum máli?

Danska stjórnin hevur áður umhugsað at brúka løgreglu og marinu í samband við sjálvstýrisstremban føroyinga fyri stívliga 50 árum síðani. Føroyingar fáa seg neyvan at trúgva, at slíkt kann endurtaka seg, hóast evsta stjórnarvaldið, sum liggur á Slotsholminum í Keypmannahavn, óivað eisini vil hava løgregluvaldið í síni hond. Er hetta veruliga orsøkin til, at stjórnin setir seg ímóti, at føroyingar yvirtaka løgverju og rættarmál?

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ein vanærulig skomm!

**Hanna Lisberg**



Jóannes Eidesgaard segði við Svf, at hann hevði valt sær til lívsstarv at verða politikkari!

Tú baðst ikki okkum veljarar at velja teg, tí tú ætlaði tær at verða breyðella búkpolitikkari, nei, tú skuldi veita gomlum og veikum og teim lægst løntu betri kor. Á denn skomm!

Sama skoðsmál skal Vilhelm Johannesen fáa (limur í fíggjarnevndini).

Hvat samgongan ger undrar ikki meg; teir hækka fyrst sínar egnu lønir og pensiónir, tí tá er lættari at sita sum »loysari«, tá ein hevur tryggjað sín egna búk – teir vóru kortini væl hjálptir av tykkum!

Nú er tíð uppá at skifta út – setið unglingar og oldingar við rórið, tá væl verður í vár. Verri enn hesi verða tey ikki!

Hann náði tú meg! Nú skal fólkafloksmaður royna at fáa broytt støðuna; eg meini tað! Slíkir rópa seg javnaðarmenn!! Skammið tykkum.

# Lønir og eftirlønir til politikarar út um tinggátt

**Helena Dam á Neystabø,**
*Sjálvstýrisflokkurin*



Málið um eftirlønir til landsstýrismenn bæði núverandi og fyrrverandi kemur aftur á tingborð. Og tá ið tað er liðugt viðgjørt í tinginum, átti tað ikki at komið fyri aftur har, men í framtíðini verið viðgjørt av uttanveltaðum fólki, sum hava innlit í slíkar spurningar.

Landsstýrismaðurin í lógarmálum, Høgna Hoydal, hevur ført somu sjónarmið fram. Eg havi tí vent mær til hansara við fyrispurningi, um landsstýrið skal leggja málið fram, ella um eg sjálv – vónandi saman við øðrum tingmonnum, skal leggja tað fyri tingið. Undir øllum umstøðum skal málið aftur í tingið.

Tað er at fegnast um, at fleiri og fleiri nú eru samd í hesum sjónarmiði, at tað sjálvandi eiga at vera uttanveltað fólk, ið viðgera og gera av, hvat politikarar skulu fáa í løn og eftirløn. Fólk, sum hava innlit í hesar spurningar.

Slíka skipan áttu vit at havt fingið fyri langari tíð síðani – og nú eiga vit at nýta tað høvi sum er, at kanna eftir, um Løgtingið hevur samtykt eina lóg um eftirlønir til landsstýrismenn, sum ikki er nóg væl viðgjørd. Einki er at ivast í, at ov skjótt er atborið, at vit møguliga hava gjørt broytingar í lógini, sum eru í andsøgn við endamálið við lógaruppskotinum, sum var at javnseta løgtingsmenn og landsstýrismenn, og gjørt lógina afturvirkandi á ein hátt, sum ikki kann forsvarast.

Verður nevndin sett sum skjótast, ber til at broyta lógina. Tí hon fær ikki gildi fyrr enn 1. januar 2002. Og sjálvandi skulu vit gera broytingar, sum fyribyrgja, at nakar fær rætt til ov høga eftirløn.

Uppgávan hjá hesari nevndini skal vera at gera eina neyva lýsing av, hvat er rætt og rímiligt, tá vit tosa um løn og eftirløn til landsstýrismenn og løgtingsmenn. At vísa á, at eftirløn hjá politikarum eisini er ein uppsparingsskipan sum hjá øðrum borgarum, og at nevndin t.d. eftir hvørt løgtingsval ger tilmæli til, hvussu lønirnar og eftirlønirnar skulu vera í næsta valskeiði.

Henda skipan skal vera galdandi til vit hava broytt stýrisskipanina og orðað grundlógina soleiðis, at tað er lógarfest, at tað verða uttanveltað fólk, sum taka støðu til lønarviðurskiftini hjá politikarum. Soleiðis hava tey gjørt í Íslandi, og tað virkar eftir øllum at døma væl.

# Vaskar Beata hendur?

**Sjúrður Olsen**
*Býráðslimur í Havn*



Sum samgongulimur í býráðnum í Havn og formaður í teknisku nevnd havi eg part av ábyrgdini av tí hurlivasa og rokan, sum er á ferðsluviðurskiftunum í býnum nú á hásumri.

Men av tí at slík arbeiði mugu gerast hesa ársins tíð, og at tað er so nógv sum liggur á láni hesum víkjandi, fingu vit einki asfalt, sum bara verður leverað ein lítlan part av árinum.

Og bæði politikarar og embætisfólk gera alt, sum gerast kann, fyri at fáa arbeiðini avgreidd, so lítið ørkyumlandi sum tað nú einaferð letur seg gera, soleiðis at ferðsla og fólk kunna hóra undan.

Beata, sum er partur av samgonguni og sostatt hevur ein áttandapart av ábyrgdini av hesi støðu, átti heldur at komið við góðum ráðum á samgongufundum okkara, sum eru einaferð um vikuna, heldur enn at farið út alment at vaska hendur í borgarans eygum.

Hetta er eftir mínum tykki óseriøst, og fari eg tí grundað á hendan atburð, alment at heita á Beatu um at koma við ítøkiligum og positivum hugsanum, sum kundu hjálpt upp á slíkar støður, og sum sagt at gera hetta fyrst á okkara samgongufundum.

Umráðandi er, at vit, sum mynda meirilutan í Tórshavnar býráð, rógva á sama báti, annars kann hurlivasin skjótt gerast størri, og tað var ikki tað, ið vit lovaðu okkara borgarum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## VIÐMERKINGAR

# Føroya Banka dámar ikki niðurstøðu í Grannskoðarakanning

**Sigurd Poulsen**



Jørn Astrup Hansen hevur grein í Sosialinum fríggjadagin 13. juli 2001 sum uppfylging av kanning, sum Grannskoðaravirkið INPACT hevur gjørt av rentutilskriving landsbankans eftir umbøn frá Fíggjarmálastýrinum. Greinin endurtekur nakrar skeivleikar, sum landsbankin við hesum fer at fáa aftur á beint.

**Avkastið hjá landsbankanum betur enn hjá peningastovnunum.**

Føroya Banki hevur nú fleiri ferðir ført fram, at landsbankin bert gevur 3 % í rentu, meðan Føroya Banki kundi givið landskassanum 5 % í rentu.

Kanningin hjá Grannskoðaravirkinum INPACT vísir hinvegin, at samlaða avkastið av landskassans innistandandi í landsbankanum seinastu 5 árini hevur verið 4,93 % í meðal.

Kanningin vísir eisini, at: “ burtursæð frá 1999 hevur landsbankin betri meðalavkast enn føroysku peningastovnarnir undir einum.”

Grannskoðaravirkið kemur tí til ta niðurstøðu, at: ”tað er tí ikki grundarlag fyri at staðfesta, at peningastovnarnir við einari peningarøktaravtalu høvdu givið landskassanum størri avkast í tíðarskeiðnum 1996-2000, enn tað avkast landsbankin samanlagt hevur givið landskassanum í tíðarskeiðnum.”

**Landsstýrið hevur ikki inngoldið eginkapitalin.**

Ein og hvør fíggjarstovnur hevur fyri neyðini ein ávísan eginpening fyri at vera førur fyri at taka váða av sínum íløgum. Av tí, at landsstýrið valdi ikki at inngjalda eginpeningin frá byrjan av virksemi landsbankans, so hevur landsstýrið goldið eginpeningin við at lata ein part av avkastinum verða standandi í landsbankanum.

Landsbankalógin er frá 1978. Hon ásetur, at stovnsfæið er 50 mió kr, sum landskassin útvegar við ábyrgdarskylduskjali. Tað vil siga eingin inngoldin eginogn, men lógin fyriskrivar, hvussu konsolidering av bankanum skal fara fram. Landsbankin fór at virka í 1988 og tað núverandi fíggjarvirksemið byrjaði í 1993. Í 1993 var rentuberandi eginognin lítil og eingin og enn er hon í minna lagi. Rentuberandi ella inntøkuskapandi eginognin, er so at siga høvuðsframleiðslutólið hjá einum fíggjarstovni, tí at tað er henda eginognin, sum ger stovnin føran fyri at taka fíggjarligan váða og samstundis viðlíkahalda virðið á eginognini.

Hevði rentuberandi eginogn landsbankans í dag verið nútíðarvirðið av 50 mió 1978-krónum, so hevði landsbankin betri kunna tikið íløguváðan og samstundis optimerað avkast og gjaldføri. Samstundis hevði landsstýrið fingið høvuðspartin av landsbankans avkasti útgoldið sum renta ella sum yvirskot. Rentuberandi eginogn landsbankans er tí ein íløga hjá landskassanum, sum skapar meirvirði, og ikki ein kostnaður, sum Føroya Banki ger tað til. Annað er, at tað hevði verið skilabetri av landsstýrinum, at konsolidera landsbankan við einum kapitalinnskoti enn at konsolidera hann yvir raksturin, tí at tað tekur ov langa tíð.

**Var eginkapitalurin inngoldin, hevði landsbankin goldið landskassanum útvið 5 % í avkasti.**

Landsbankin hevur ongantíð fingið gjaldføran eginkapital inngoldnan. Eginpeningur landsbankans er komin uppá 120 mió. kr., við at ein partur av avkasti landskassans er vorðið standandi í landsbankanum. Til samanberingar skal nevnast, at landskassin gjøgnum Fíggingargrunnin hevur goldið 2700 mió. kr. til eginpening í Føroya Banka.

Hevði rentuberandi eginogn landsbankans verið t.d. 200 mió. kr. árini 1996-2000, hevði landsbankin goldið landskassanum útvið 4,93 % p.a. í meðal sum rentu og yvirskotsbýti.

# Loyisingarmiliardirnar kundu komið pensionistum okkara tilgóðar !

**Tummas Eli Høj Joensen**

Landstýrið ætlar at yvirtaka flogvøllin og síðan skal hetta verða ein varði fyri hesa samgonguna, viðvíkjandi yvirtøkum. Teir skulu kunna siga, at vit hava set skjøtil á loysingina frá Dannmark, ella at nú kunnu vit bretta okkum á og siga at vit eru Føroyingar (Eitt FULLVELDI ).

Allir tjóðveldismenn ganga nú so latnaðir og rankir, tí teir eru undanslopnir undirbráttligheitsokinum (leysir frá Danmark), at teir detta næstan afturav so fattir eru teir.

Men hvat nú? Er tað ikki Tjóðveldisflokkurin ið krevur, at danskarar skulu brúka pening til nútímansgerðan av flogvøllinum áðrenn vit yvirtaka vøllin ? Hvat vil hettar siga ? Jú, danskarar skulu enn einaferð gjalda fyri okkum føroyingar ! Ein skuldi trúð, at teir vóru samríkjamenn !

**Eldraøkið**

Hoyr nú her, hvat hesir loysingarmenn gera í einum øðrum máli.

Eldrarøktina í Føroyum hevur landstýrið lagt út til kommununar at taka sær av. Um tað er so gott, veit eg ikki; men eitt veit eg, landstýrið hevur í hvussu so er óbeinleiðis veitt pensionistunum í Føroyum ta trygd, at tað helst verður ein seinur dagur, áðrenn tey gomlu fáa øll tey heimini, ið eru neyðug á eldraøkinum. Kommununar makta ikki hesa uppgávuna við einum so stuttum skotbráði. Landstýrið hevur jú eisini kravt eitt íløguloft fyri kommununar.

Alt hetta, er ein foring fyri, at tey gomlu fáa tað ið teimum er so hjartaliga væl unt innanfyri eina stutta tíð. Vit vita øll hvussu stórur tørvurin er. Allar kommununar vilja gjarna gera hesar bygningar, men hetta kemur tíverri fyri tey ið vara av, at taka alt ov langa tíð.

Eg haldi sjálvur, at landstyrið heldur skuldi syrgt fyri, at brúkt 1/6 av sínum stóra yvirskoti, til at hjálpt kommununum til hesa uppgávuna. Á sama hátt sum teir vilja hava at danskara skulu nútímansgera flogvøllin áðrenn vit yvirtaka hann, skuldu teir eisini áðrenn kommununar yvirtóku eldraøkið, syrgt fyri at eldraøkið var útbygt forsvarliga. Um hetta var útgangstøði fyri eldrarøktina, so var alt jú nógv lættari at yvirtaka hjá kommununum, ikki so, Tjóðveldisflokkurin?


**Massage**

**1-årig uddannelse**
**(ca. en weekend om måneden)**

Starter: den 25. til 26. august 2001
Sted: Tórshavn
Pris: 1.200 kr./weekend

**Jens Melgaard**
(lærer, massør og afspændingspædagog, DAP
ring efter program tlf. 0045 38 71 72 93

**Sig okkum frá**

Hendir okkurt, sum
er áhugvert hjá øðrum at vita,
eru vit til reiðar at bera tíðindini víðari.

Sosialurin leggur seg eftir at bera
tíðindi úr øllum landinum.

Vit koyra runt í tí kenda, gráa Toyota
bilinum við eyðkendu frámerkjunum.

Ferðandi blaðstjórnin er dagliga úti kring landið.
Vit eru at hitta á telefon nr. 31 18 20.
Telefax nr. 31 47 20.

Edvard Joensen mannar í løtuni ferðandi
blaðstjórnina. Hann er at hitta á telefon nr.
42 36 17 ella á fartelefon nr. 22 05 07.
Eisini ber til at senda teldupost til:

edvard@sosialurin.fo
ella post@sosialurin.fo



Sosialurin

Sosialurin
Veðrið
Bilar
Lýsingar
Tíðindi
Viðmerkingar
Ítróttur
Nøvn
Skráir
Tiltøk

